# United kann fáa Ribery

Franski stórspælarin Franck Ribery, sum spælir fyri týska stórfelagið FC Bayern, fer møguliga at skifta felag í summar, og blaðið News Of The World heldur, at Barcelona ella Manchester United fáa klørnar í spælaran. Ribery hevur júst gjørt drúgvan sáttmála við Nike, og so passar tað sambært enska blaðnum best, at hann fer til eitt Nike-felag. Og har standa Barca og United fyrst fyri.



# Ronaldo samdur við Real

Virda enska blaðið The Guardian skrivar um vikuskiftið, at portugisiski stórspælarin Cristiano Ronaldo hevur gjørt eina avtalu við spanska felagið Real Madrid. Nú manglar bara, at Manchester United og Real Madrid semjast um, at Ronaldo skal skifta felag. Sambært The Guardian avgjørdi Ronaldo í september í fjør, at hann skal gevast í Unted eftir hetta kappingarárið.

## Hugflog í ein hálvan tíma

Jógvan Martin Olsen var væl nøgdur við úrslitið í fyrsta landskappingardystinum, síðani hann tók við venjarastarvinum í Víkingi. Men samstundis ásannaði hann, at tað sum 2. hálvleikur leið kundi havt endað øðrvísi, enn tað gjørdi:

- Eg eri sera væl nøgdur við avrikið fyrsta hálva tíman. Vit fáa mál beinanvegin, og vit høvdu møguleikar at gera mál fleiri aðrar ferðir, men tað spurdist ikki meiri enn nær við og næstan støður burturúr, sigur Víkinga venjarin, sum var minni væl nøgdur við 2. hálvleik:

- Tá missa vit leikligu yvirvágini. At kappingarárið er lítið liðið sást aftur í, at vit hava ilt við at finna hvønn annan, flytingarnar eru ikki so góðar, og ÍF kundi væl havt javnað. Tíbetur gjørdu teir ikki tað, og í yvirtíðini skoraðu vit aftur.

## Tað er langt á mál

Fuglfirðingar hava ætlað sær at kappast, har tað er mest spennandi, men avrikið fríggjakvøldið bendi ikki á, at tað skal vera soleiðis:

- Vit trúgva framvegis upp á tað, tí vit hava gott fólk, og hugburðurin undir venjing hevur verið góður, sigur miðvallarin Høgni Zachariasen, sum eisini staðfestir, at tað er langt á mál

- Tað sást væl, at tað enn restar nógv í at samanspæla liðið. Tað fara vit at arbeiða víðari við, og eg eri vísur í, at vit fara at standa okkum betri, enn vit gjørdu hesa ferð.



*Fuglfirðingar spentu álopsbogan høgt í royndini at javna, men tað gjørdist Víkingur, sum tók stigini, tá fyrsti Vodafone-dysturin yvir høvur var á skránni fríggjakvøldið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Víkingur-ÍF 2-0 (1-0):

# Víkingar flúgvandi í eina løtu

**Fyrsta hálva tíman var heimaavrikið sannførandi, men í 2. hálvleiki kundu gestirnir úr Fuglafirði væl havt javnað**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

*Víkingur*

*ÍF*

Í dýrdarveðrinum fríggjakvøldið var áskoðaratjøldin óvanliga stór í Sarpugerði. Ársins fyrsti landskappingardystur var á skránni, og spenningurin var eyka stórur, tí tað var í hesi uppgerðini í fjør, at ÍF í fyrstu uppgerðini ímóti samanlagda grannafelagnum fyri fyrstu ferð í næstan tredivu ár vann í Gøtu.

Hesa ferð fóru fuglfirðingar inn um Varmakeldueið við ongum. Víkingur vann 2-0, og tað var serliga í 1. hálvleiki, at heimaliðið var leikliga omaná. Súni Olsen var á sentrala miðvøllinum saman við Sølva Vatnhamar, teir báðir settu ferð á skjótt uppspæl, sum ofta varð vandamikið, sum gjørdist serliga vandamikið, tí vongverjarnir, Sverri Jacobsen og Hanus Jacobsen, arbeiddu hart og luttóku væl í álopsspælarinum.

Sam Jacobsen í høgru og Magnus Skoralíð í vinstru syrgdu fyri breiddini, Símun Louis Jacobsen var næstfremstur, og Andrias Lava Olsen vísti við sínum skjótleika og agressiviteti, hví hann í løtuni verður roknaður at vera okkara fremsti álopsspælari.

Longu eftir seks minuttir lá bólturin aftanfyri Andras Gango í ÍF málinum: Hanus Jacobsen, sum var dúgligur at koma framvið í vinstru, legði eitt sindur forkølað innfyri, og eitt sindur tilvildarliga endaði bólturin hjá Magnusi Skoralíð, sum skoraði ársins fyrsta mál.

Tað kundi væl havt verið størri munur, tá ið dómarin bríksladi fyri síðstu ferð í 1. hálvleiki, tí heimaliðið hevði verið greitt omaná. Fuglfirðingar høvdu ilt við at finna hvønn annan, miðverjarnir høvdu tað trupult, miðvøllurin var ofta um ein háls í góðum heimaspæli, og Bartal Eliasen, sum var einsamallur á toppinum, hevði torførar treytir millum Niclas Niclasen og Atla Gregersen.

### Teir reyðu omaná

Tað var týðuligt, at víkingarnir fegnir vildu hava alt avgjørt beinanvegin eftir steðgin. Tvey hornaspørk bóru spentar støður við sær frammanfyri Andras Gango, men ÍF reið stormin av, og so við og við vóru tað teir reyðu, sum fóru at seta dagsskránna.

Nenad Saric var meiri framrættaður, enn hann hevði verið í 1. hálvleiki, og eftir fríspæling av Frank Poulsen var hann í góðari støðu. Men lobbarin upp um Geza Turi fór eisini upp um Víkinga málið.

Sum heild gjørdist álopsspælið tilvildarligt og lítið hugflogsríkt. Eitt sindur fjáltursstungu heimamenninir royndu við longum sendingum fram til Andrias Lava Olsen, sum Poul Ennigarð og Jonn Thomsen pakkaðu væl inn, og í hinum endanum varð ofta lossað fram í vónini um, at tað skuldi eydnast Bartali Eliasen at syrgja fyri møguleikum og málum.

Sum tíðin leið royndu fuglfirðingar at spenna álopsbogan, og at enda brast hann. Høgri vongverjin hjá Víkingi, Sverri Jacobsen, legði langa sending fram á mótstøðuhálvuna. Poul Ennigarð tóktist hava tak á støðuni, men so var tað, at innskifti Finnur Justinussen fekk tak á, legði innfyri til eisini innskifta Hans Jørgen Djurhuus, sum setti bóltin í netið.

2-0 og heimafagnaður. Trý stig eru týdningarmikil, og avrikið í 1. hálvleiki eigur at geva Víkingi mót um, at tað kann fara at hilnast væl.

Tað eydnaðist ikki ÍF at vinna stigið burtur úr javnleikinum, sum teir leingi høvdu í eygsjón. Men tað fara neyvan at ganga fleiri umfør, áðrenn ÍF væl og virðiliga fer at koma upp á talvuna.